VÁGA KOMMUNA

# Gerðabók

## Býráðið

**Dagfesting:** 21.12.2021 kl. 18:00
**Fundarstaður:**
**Málnr.:** 21/00003

Til staðar: Bjarni Prior, Dagbjørn Hansen, Rósa Samuelsen, Jónhard Selfoss, Tórdis Dam Johannesen, Sólfríð Fjallsbak, Jóanis Albert Nielsen, Herborg Gaardlykke

Varalimir: Martin Simonsen, Jóhannus Hansen, Oddmar Ravnsfjall

Ikki til staðar: Albert Ellefsen, Ásla Leila Johansen, Jens Gaardlykke

Aðrir partar:

Fundarskrivari: Jóhan Hendrik Ellefsen


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Kunning** | | | |
| 9/21 | 21/00105-14 | Mál beind í nevnd 2021 | 3 |
| **Til støðutakan** | | | |
| 155/21 | 21/00647-6 | Normering á stovnsøkinum | 4 |
| 156/21 | 21/00635-2 | Klippiútgerð til sløkkiliðið | 5 |
| 157/21 | 21/00799-3 | Tilboð uppá intranet frá Intra.fo | 6 |
| 158/21 | 21/00803-3 | Tilboð uppá nýtt gólv í ítróttarhøllini | 7 |
| 159/21 | 21/00755-1 | EXTRA21_03 Eykaætlan 03 2021 | 8 |
| 160/21 | 21/00804-2 | Felagskommunal reglugerð fyri óljóð frá skipum | 10 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 161/21 | 21/00787-1 | Borgarstjórin leggur fram uppskot um at broyta reglugerðina fyri útlutan av kommunalum grundstykkjum. | 11 |
| 162/21 | 21/00721-3 | Marknaumskipan millum matr.nr., 159q og matr.nr. 159c, 159p og litra s í Sandavági | 13 |
| 163/21 | 21/00733-2 | Umsókn um sundurbýti til samanlegging millum matr. nr. 397a og 397c í Vatnsoyrum til ummælis | 15 |
| 164/21 | 21/00775-2 | Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 219l í Sandavági til ummælis | 16 |
| | | | |

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

Kunning

## 9/21 Mál beind í nevnd 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 21.12.2021 | 9/21 |

**Málslýsing:**

**Býráðið 21. december 2021:**

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

Til støðutakan

**155/21 Normering á stovnsøkinum**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 06.12.2021 | 83/21 |
| 2 Býráðið | 21.12.2021 | 155/21 |

**Málslýsing:**

Býráðið hevur á fundi 23. november avgjørt at játta fígging til hægri normering á stovnsøkinum. Støða skal eisini takast til hvussu nógv børn skulu vera á hvørjari stovu.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 06. december 2021:**

Mælt verður til at normeringin í vøggustovunum skal vera 11 tímar pr. barn, umframt 0,25 tímar pr. Barn til annað arbeiði.
Mælt verður til at normeringin í barnagarðsstovunum skal vera 6,6 tímar pr. barn, umframt 0,15 tímar pr. Barn til annað arbeiði.
Mælt verður til at hava 40 leiðaratímar, og 20 varaleiðaratímar pr. stovn.

Mælt verður til at normeringarnar verða endurskoðaðar aftur til næsta fíggjarár.

**Býráðið 21. december 2021:**

Einmælt samtykt.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

## 156/21 Klippiútgerð til sløkkiliðið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.12.2021 | 113/21 |
| 2 Býráðið | 21.12.2021 | 156/21 |

**Málslýsing:**

Vísandi til fund í Brunanevndini 14 sept.

Sløkkiliði hevur tørv á nýggjari klippiútgerð. Gamla klippiútgerðin hjá "Vága Bjargingarfelag" sum sløkkiliðið hevur haft tey seinastu 25 - 30 árini, er ikki brúkilig longur. Hon hevur verði á verkstað og kann ikki reparerast.

Orsaka av hesum klára vit ikki at uppfylla krøvini til okkara sløkkilið. Trygdin og responstíðin í kommununi er ikki í ordan og vit útfylla ikki tilbúgvingarætlanina sum landsins myndugleikar liggja inni við fyri Vaga Kommunu.

Nýggja útgerðin kostar kr. 223.885,75 íroknað kommunu mvg.

**Fíggjarnevndin 16. december 2021:**

Viðmælt at keypa útgerðina, sum kann fíggjast av játtanini í ár.

**Býráðið 21. december 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

# 157/21 Tilboð uppá intranet frá Intra.fo

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.12.2021 | 114/21 |
| 2 Býráðið | 21.12.2021 | 157/21 |

## Málslýsing:

Umsitingin, saman við dagstovnaleiðarunum hevur í eina tíð arbeitt við at fáa eitt intranet til starvsfólk og foreldur. Tá vit byrjaðu samskiftu vit við ein danskan veitara, men hetta bleiv ikki til nakað konkret, tí ynski varð at fáa eina føroyska skipan. Nú hava vit so funnið ein føroyskan veitara, sum kann veita eina nøktandi skipan. Talan er um intra.fo.

Umsitingin hevur fingið eitt tilboð frá Intra.fo, sum fíggjarnevndin skal taka støðu til. Tilboðið er uppá intranet 4 intranet, eitt til hvønn dagstovn umframt umsitingina /teknisku deild.

## Fíggjarnevndin 16. december 2021:

Viðmælt at taka av tilboðnum frá INTRA.fo

## Býráðið 21. december 2021:

Einmælt samtykt at beina málið í mentunar- og trivnaðarnevndina.

Formansváttan:

## 158/21 Tilboð uppá nýtt gólv í ítróttarhøllini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 06.12.2021 | 84/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.12.2021 | 111/21 |
| 3 Býráðið | 21.12.2021 | 158/21 |

**Málslýsing:**

Í eina tíð hevur verið arbeitt við møguliga at skifta gólv og ljós í høllini á Giljanesi. Gólvið hevur ikki verður skift í 30 ár.

Borgarstjórin hevur biðið um tilboð frá Sport & Parquet ApS, uppá nýtt gólv til ítróttarhøllina. Í hesum sambandi hevur kommunan móttikið tvey tilboð frá Sport & Parquet ApS.

Tilboð 1: Hetta er tilboð uppá eitt PU gólv. Talan er um eina 9mm regupolmáttu og eitt 3mm basislag omaná, umframt eitt topcoat í grønum.

Tilboð 2: Hetta er eitt tilboð uppá eitt Kombielastiskt sportsgólv (krydsfinergólv).

Arbeitt verður í løtuni við at fáa tilboð uppá nýggj ljós í høllini, men eru hesi tilboð ikki komin uppá pláss enn.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**
Umsitingin mælir til at taka av tilboð 1.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 06. december 2021:**

Mælt verður til at fylgja tilmælinum frá umsitingini við at taka av tilboð nr. 1.

**Fíggjarnevndin 16. december 2021:**

Viðmælt at taka av tilboð 1.

**Býráðið 21. december 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 159/21 EXTRA21 03 Eykaætlan 03 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 109/21 |
| 2 Býráðið | 23.11.2021 | 150/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.12.2021 | 117/21 |
| 4 Býráðið | 21.12.2021 | 159/21 |

## Málslýsing:

## 1. viðgerð av eykaætlan 03 2021

| Finanskontonr. | Navn | Rakstrarstað Kode | Útgreining Kode | 01-11-2021 |
|---|---|---|---|---|
| 1 | **Rakstrarútreiðslur** | | | |
| 1420 | Umboðan | 114 | | 70.000 |
| 1471 | Postgjøld | 114 | | 5.000 |
| 1479 | Keyp av tænastuveitingum annar | 114 | | - 50.000 |
| 1530 | Skrivstovuútbúnaður | 114 | | - 25.000 |
| 7140 | Flytingh til eldrasamstarv | 221 | | 573.000 |
| 1110 | Løn, mánaðarlønt | 30300 | L-STU | 105.000 |
| 1110 | Løn, mánaðarlønt | 30300 | L-UMSIT | 50.000 |
| 3131 | Bygningar, privat | 31052 | | - 100.000 |
| 3131 | Bygningar, privat | 41004 | | - 12.256.536 |
| 7310 | Flyting til landið | 418 | | 35.000 |
| 1420 | Umboðan | 514 | | 50.000 |
| 1112 | Løn, tímalønt | 61400 | | 500.000 |
| 1160 | Arbeiðsmarknaðargjøld | 61400 | | 15.000 |
| 1170 | Eftirlønir | 61400 | | 30.000 |
| 3141 | Vegir, tunnlar, havnir o.a., p | 61810 | | - 1.400.000 |
| 1110 | Løn, mánaðarlønt | 62210 | | - 100.000 |
| 1112 | Løn, tímalønt | 62210 | | - 100.000 |
| 1110 | Løn, mánaðarlønt | 62400 | | - 145.000 |
| 3141 | Vegir, tunnlar, havnir o.a., p | 62410 | | 1.400.000 |
| 1110 | Løn, mánaðarlønt | 62610 | | - 180.000 |
| 1170 | Eftirlønir | 62610 | | - 20.000 |
| 3141 | Vegir, tunnlar, havnir o.a., p | 711 | | - 500.000 |
| 1469 | Keyp av vørum annars | 714 | | 150.000 |
| 1479 | Keyp av tænastum | 714 | | - 60.000 |
| 1651 | Umvælingar- og viðlíkahaldsútr | 714 | | - 90.000 |
| | **Íalt** | | | **- 12.043.536** |

## Viðmerkingar:

§ 01 Javning millum konti kr. 0,-

Formansváttan:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| § 02 | Meiravseting til Heimatænastuna | | kr. | 573.000,- |
| § 03 | Meiravseting Fyribyrgjandi tiltøk | | kr. | 155.000,- |
| § 03 | Minniavseting løga (Barnagarðar) | - | kr. | 100.000,- |
| § 04 | Meiravseting Skúlin á Trøðni | | kr. | 35.000,- |
| § 04 | Minniavseting løga ( Skúlin á Giljanesi ) | - | kr. | 12.256.536,- |
| § 05 | Meiravseting Jóla- og nýttárshald | | kr. | 50.000,- |
| § 06 | Javning millum rakstrarkonti | | kr. | 0,- |
| § 06 | Javning millum løgukonti | | kr. | 0,- |
| § 07 | Minniavseting løga (Bingjupláss) | - | kr. | 500.000,- |

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 23. november 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

**2. viðgerð av eykaætlan 03 2021**

**Fíggjarnevndin 16. december 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 21. december 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 160/21 Felagskommunal reglugerð fyri óljóð frá skipum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 09.12.2021 | 19/21 |
| 2 Býráðið | 21.12.2021 | 160/21 |

**Málslýsing:**

Arbeiðið at orða eina felagskommunala reglugerð um óljóð frá skipum er nú komið á mál.

Fríggjadagin 19. november 2021 varð reglugerðin løgd fram á borgarstjórafundi í Kommunufelagnum. Semja var um at senda øllum kommununum reglugerðina við umbøn um at seta málið á skrá til fyrstkomandi kommunustýrisfund. Eisini mælti borgarstjórafundurin øllum kommunum til at samtykkja reglugerðina í óbroyttum líki.

Kommunufelagið mælir tí **øllum kommunum** til at:

1. **Seta felagskommunalu reglugerðina á skrá á fyrstkomandi kommunustýrisfundi, og**
2. **samtykkja reglugerðina í (innihaldsliga) óbroyttum líki**

**Vinnu- og havnanevndin 09. december 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 21. december 2021:**

Samtykt at beina málið aftur í Vinnu- og havnanevndina.

Formansváttan:___________

**161/21 Borgarstjórin leggur fram uppskot um at broyta reglugerðina fyri útlutan av kommunalum grundstykkjum.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.12.2021 | 121/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.12.2021 | 116/21 |
| 3 Býráðið | 21.12.2021 | 161/21 |

**Málslýsing:**

Borgarstjórin leggur soljóðandi uppskot fyri býráðið til støðutakan:

Treytir viðvíkjandi sølu av grundøkjum:

Vága kommuna vil tryggja sær, at selt verður til tey, ið veruligha hava tørv á grundøki, og hava ítøkiligar ætlanir um at byggja sethús á tað. Tí raðfestir kommunan soleiðis:

Áhuga rinda Vága kommunu eitt gjald á kr. 10.000,- fyri at seta seg á bíðilista. Gjaldið verður endurrindað um viðkomandi tekur seg av listanum, og annars drigið frá keypsprísinum, tá grundstykkið skal gjaldast.

Annars er tilsøgnin uppá grundstykki treytað av:

1. at viðkomandi, áðrenn tilsøgn verður givin, letur kommununi váttan um fígging/tøkan pening frá peningastovni.
2. at viðkomandi innan 6 mánaðir eftir tilsøgn letur kommununi ítøkiligar ætlanir/tekningar, og umsókn um byggiloyvi.
3. at bygt verður innan fyri tvey ár. Er bygging ikki byrjað á tillutaðum grundstykki tvey ár eftir, hevur kommunan rætt, men ikki skyldu til, at krevja grundstykkið aftur móti at rinda sama prís fyri grundstykkið, sum umsøkjarin rindaði fyri tað.
4. ætlar viðkomandi ikki at byggja tvey tey næstu árini, ber ikki til at seta fram ynski um ítøkiligt stykki.

Tá ið treytirnar undir pkt. 1 og 2 eru ,loknar, verður skeytið útskrivað – treytað av, at keypspeningurin tá verður goldin.

Formansváttan:______________

VÁGA KOMMUNA

**<u>Tekniska nevnd 09. december 2021:</u>**

Viðmælt

**<u>Fíggjarnevndin 16. december 2021:</u>**

Viðmælt.

**<u>Býráðið 21. december 2021:</u>**

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

Formansváttan:______________

## 162/21 Marknaumskipan millum matr.nr., 159q og matr.nr. 159c, 159p og litra s í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.12.2021 | 118/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.12.2021 | 115/21 |
| 3 Býráðið | 21.12.2021 | 162/21 |

**Málslýsing:**

Hetta er eitt gamalt mál frá Sandavágs kommunu. Fyrsta skjalið er dagfest 04.06.2004.

Talan er um gøtuna undir matr. nr. 159q og partur av stykkinum eystanfyri og vegnum vestanfyri.

Arnold Thomassen frá Umhvørvisstovuni hevur verði á staðnum og mált upp, og hevur hann eisini tosað við Eydnu Gregersen um málið. Eydna er samd við uppskotinum hjá Umhvørvisstovuni.

Marknaumskipanin er hendan.

litra as letur 57 m2 til matr.nr. 159q
matr.nr. 159c letur 36 m2 til matr.nr. 159q
matr.nr. 159p letur 317 m2 til matr.nr. 159q
matr.nr. 159s letur 27 m2 til matr.nr. 159q
matr.nr. 159q letur 15 m2 til matr.nr. 159s

**Viðmerkingar frá umsitingini.**

Tekniska nevnd verður biðin um at takað støðu til um marknaumskipanin skal gerast, sum Umhvørvisstovan mælir til.

**Tekniska nevnd 09. december 2021:**

Viðmælt

Formansváttan:__________

**<u>Fíggjarnevndin 16. december 2021:</u>**

Viðmælt.

**<u>Býráðið 21. december 2021:</u>**

Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 163/21 Umsókn um sundurbýti til samanlegging millum matr. nr. 397a og 397c í Vatnsoyrum til ummælis

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.12.2021 | 119/21 |
| 2 Býráðið | 21.12.2021 | 163/21 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevur sent umsókn um sundurbýti til samanlegging millum matr. nr. 397a og 397c í Vatnsoyrum til ummælis

Matr. nr. 397a letur 700 $m^2$ til matr. nr. 397c

**Tekniska nevnd 09. december 2021:**

Viðmælt

**Býráðið 21. december 2021:**

Viðmælt.

Formansváttan:____________

## 164/21 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 219l í Sandavági til ummælis

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.12.2021 | 120/21 |
| 2 Býráðið | 21.12.2021 | 164/21 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevur sent umsókn um sundurbýti av matr. nr. 219l í Sandavági til ummælis.

Eigararnir søkja um at sundurbýta matr. nr. 219l í tríggjar partar. Eitt stykki á 5.470m2, liggur í øki S: summarhús, og eitt í 11.639m2, liggur í øki K: landbúnaður, skulu býtast frá restini av ognini, við sølu fyri eyga.

**Tekniska nevnd 09. december 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 21. december 2021:**

Viðmælt.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

Fundurin lokin kl. 19:15

Bjarni Prior

Martin Simonsen

Dagbjørn Hansen

Rósa Samuelsen

Jónhard Selfoss

Tórdis Dam Johannesen

Oddmar Ravnsfjall

Sólfríð Fjallsbak

Jóhannus Hansen

Jóanis Albert Nielsen

Herborg Gaardlykke

Formansváttan:__________